Summar SURR



Randi Jacobsen
randi@sosialurin.fo

# Útflytið útreiðslurnar

Neyvan nakar billar sær inn, at fíggjarlógin fer at halda í ár heldur.

Stórar sparingar eru gjørdar á almannaøkinum, men summar av ætlaðu sparingunum eru lagdar til viks, tí tær kunnu ikki gjøgnumførast, uttan at tað rakar sera meint.

Almannaøkið og heilsuverkið kosta nógv, men vóru Føroyar eitt land fyri øll, kostaðu hesi øki nógv, nógv meira, enn sett er av til tey á fíggjarlógini.

Landið útflytur nevniliga nógvar av almannaútreiðslunum.

Heilt nógvar stakir uppihaldarar eru fluttir av landinum ella flyta ikki heim aftur, tí umstøðurnar eru nógv betri aðrastaðni.

Og hvussu nógvar familjur eru ikki fluttar av landinum, tí tey hava børn við serligum tørvi?

Nøkur eftirlønt fólk hava valt at búseta seg í Danmark og liva síni ellisár har. Landið sleppur frá at gjalda teimum fólkapensjón.

Um almennu Føroyar ikki vilja gera tað liviligt hjá pensjonistum, støkum uppihaldarum og familjum við børnum, sum hava serligan tørv, er ikki neyðugt at spæla, at landið er fyri øll.

Tað er eingin meining í bara at geva teimum veiku samfelagsbólkunum so frægt, at tey akkurát ikki doyggja í hungri.

Hví ikki spæla við opnum kortum og bara reka allar teir veiku samfelgsbólkarnar av landinum?

Um nú eingin tænasta var til børn við serligum tørvi, fólk við serligum sjúkum ella veikleikum, og stakir uppihaldarar ongan stuðul fingu, fóru øll tey fólkini av landinum, og tað hevði verið ein stór sparing.

Vit kundu eisini sloppið av við nakrar pensjonistar aftrat, um fólkapensjónin varð lækkað. Úrslitið hevði verið lægri útreiðslur til pensjón og í framtíðini minni trýst á eldraheimini og heimarøktina.

Sí, á henda hátt kundu Føroyar av sonnum mett seg at vera eitt vælferðarsamfelag.



## Ovastevnan

Seinasta summarstevnusprellið verður í Nòlsoy leygardagin 15. august, tá Ovastevna er á skránni. Ovastevnan tekur við, har regattain sleppur, og tað plaga hvørt ár at vera fleiri bátar, bæði motordrivnir og róðrarbátar, ið halda leiðina fram úr Hósvík til Nólsoyar á stevnu. Ovastevnan hevur eittans endamál, nevniliga at skaffa pening til ein svimjihyl í Nólsoy.
Um tú ikki hevur hug ella møguleika at sigla úr Hósvík kl 14, so er ikki at stúra, tí bátar plaga at sigla pendulfart aftur og fram millum Havnina og Nólsoynna alt døgnið.
OVASTEVNAN Í NÓLSOY LEYGARDAGIN 15. AUGUST

**Spurningar til samkynda Mark Feehily í Westlife:**
Eru føroysku kvinnurnar ikki serstakliga vakrar?
Verður nøkur teirra við í flogfarinum, tá tit fara avstað aftur?
www.nordlysid.fo

**Mótsøgn ..**
Leikritini vóru øll omanfyri støðið, tí einki leikrit var nóg gott.
Rás2



## Familjulega fyri børn við breki

Á hvørjum ári skipar Zarepta fyri eini familjulegu fyri tær familjur, sum hava børn við breki. Í ár er einki undantak. Legan byrjar hósdagin 12. august og heldur áfram til sunnudagin 15. august.
Á leguni ber til hjá foreldrum og systkjum at hitta onnur í somu støðu, eins og áhugaverdir fyrilestrar plaga at vera á skránni fyri tey vaksnu. Til børnini eru hópin av tilboðum og aktivitetum.
ZAREPTA: FAMILJULEGA FYRI TEY, IÐ HAVA BØRN VIÐ BREKI 12.-15. AUGUST
WWW.ZAREPTA.FO

**Deydligt í tinginum**
LÍV í tingið í heyst
Kvf.fo



## Regatta 2010

So verða bátarnir aftur loystir fyri at sigla tað famøsa strekkið av Eiði til Hósvíkar.
Bátarnir møta á Eiði fríggjadagin 14. august, og lagt verður frá landi kl 19.00. Spakuliga verður so siglt ígjøgnum Sundalagið til Hósvíkar, har blíðskapurin plagar at vera stórur. Dansur er um náttina, eins og okkurt fæst til matna.
Tey, sum orka, fara síðani víðari til Nólsoyar leygardagin, har Ovastevnan er. Loyst verður í Hósvík um 14 tíðina.
REGATTA 2010: BYRJAR Á EIÐI 14. AUGUST KL 19 OG ENDAR Í HÓSVÍK 15. AUGUST KL 14. WWW.HOSVIK.NET

## Familjutjalding á Selatrað



KFUM-skótarnir í Føroyum skipa fyri familjulegu fyri øll tey, sum tíma. Tað er eingin treyt at vera skóti, og legan er ókeypis. Í staðin verður gjald tikið fyri teir ymsu aktivitetirnar, ið tað verður møguligt at royna á Selatrað. Millum annað ber til at royna snorkling, paintball, rapelling, kano, skattajakt, útróður, jarnsmíð, bogaskjóting, tunnuflakar, vatnland, hugna við legubálið, og prísirnir eru úr 30 krónum upp í 100 krónur, alt eftir hvussu dýrt tað er at fyrireika. Harumframt verður søla av bæði morgunmati, døgverða og nátturða, umframt café. Um tú ikki hevur hug at tjalda, ber eisini til at koma við kampingvogni, men tá má pláss bíleggjast frammanundan á Eysturoyar Kunningarstovu. Leguplássið letur upp hósdagin kl 12 og legan endar sunnumorgunin kl 11. Ikki er neyðugt at bíleggja pláss til tjaldingina og øll eru vælkomin, børn, ung og vaksin.
UM OKKURT ER AT SPYRJA UM, RING 311075 ELLA 597777
TJALDINGARLEGA Á SELATRAÐ 12.-15. AUGUST, FYRI ØLL TEY, IÐ HAVA HUG AT VERA VIÐ.
WWW.SKOTI.FO



## Konsert við Sebastian

Mikudagin 18. august kl 19.30 verður endiliga høvi at hoyra danska trubadurin Sebastian í Føroyum. Hann skuldi havt verið her fyrr í ár, men tá varð konsertin avlýst vegna øsku frá Eyðjafjallajøkli.
Sebastian hevur havt óteljandi hitt í Danmark, millum annað "Romeo", "Du er ikke alene" og "Måske ku' vi". Umframt Sebastian, so verður eisini okkara egna Lena Andersen gestur á konsertini.
Kostnaðurin er 250 kr, men um fýra ella fleiri fólk keypa saman, so er prísurin 200 kr pr høvd.
KONSERT VIÐ SEBASTIAN, MIKUKVØLDIÐ 18. AUGUST KL 19.30 Í NORÐURLANDAHÚSINUM
WWW.NLH.FO

**Havi hoyrt um trivaligar sigrar, men..:**
Føroyingar fingu ein trivaligan javnleik í talvi um vikuskifti
Rás2

Summar
**Sosialurin** - Postsmoga 76 -110 Tórshavn - Tlf. 341800
Hugskot og viðmerkingar kunnu sendast til: post@sosialurin.fo
**Redaktørur:** Eydna Skaale